gult cyan magenta svart



# Lambagenta vaskikona hjá ensku drotningini



*– Hóast eg valdi at fara av George Stagem var túrurin kortini ikki miseydnaður, tí at hava arbeitt á Balmoral Castle hevur avgjørt verið eitt upplivilsi, sigur 18 ára gamla Sunneva Lamhauge úr Lamba, sum nú gongur á HF á Kambsdali*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Seinasta summar arbeiddi 18 ára gamla Sunneva Lamhauge úr Lamba á Balmoral Castle í Skotlandi, ið er summarbústaður hjá ensku konga-familjuni. Og aftur í ár stevnir hon til Skotlands, hesa ferð við dreyminum um at vera í nánd, tá konga-familjan heldur summarfrí**

*Turið Kjølbro*

At vaska upp og niður, gera høvuðsreint, sum tað eisini eitur, er ikki nakað, vert er at rópa hart upp um. Men tá ið tað snýr seg um at vaska upp og niður fyri heimsins mætastu drotning, er søgan ein onnur. Og hetta hevur eingin onnur enn 18 ára gamla Sunneva Lamhauge úr Lamba gjørt. Í fimm vikur gjørdi hon saman við fýra gentum úr Skotlandi reint á stóra og glæsiliga slottinum Balmoral Castle, ið liggur nakað uttan fyri Aberdeen. Tað er her øll tann enska kongliga familj-an heldur summarfrí á hvørjum ári saman við vin-um og kenningum. Og tað var eisini á Balmoral Castle, at prinsaparið av Wales, Charles og Diana, vóru á brúðarferð, og somuleiðis her prinsarnir William og Henry vóru staddir, tá ið deyðsboðini komu um mammu teirra. Áin River Deen, ið liggur beint við slottið, sigst vera eitt av yndisfiskimiðum hjá enska krúnprinsinum.

Søguliga ferðin hjá Sunnevu Lamhauge byrjaði annars um borð á danska skúlaskipinum George Stage í apríl í fjør. Eftir at hava verið um borð í tveir mánaðir gjørdi hon av at fara av skipinum, tí hon treivst ikki rættiliga, og tá skipið legði at bryggju í London, mynstraði Sunn-eva av.

- Úr London fór eg til mostur mína í Aberdeen, sum lovaði at finna mær arbeiði har. Eftir tvær vikur í býnum fekk eg arbeiði í eini fyritøku, sum ger reint fyri fólk, virki og onnur. Og tað vísti seg, at vit skuldu gera høvuðsreint á slottin-um hjá sjálvari ensku drot-ningini, Balmoral Castle, greiðir Sunneva frá.

## Strang krøv

Áðrenn nakar sleppur inn um stóru grindina uttan fyri Balmoral Castle, eru nakrar treytir sum skulu lúkast. Sunneva hevur til dømis skrivað undir uppá, at hon hevur tagnarskyldu. Tí sleppur hon ikki at greiða nærri frá í smálutum, hvussu tað sær út inni á slottinum, ella frá øðrum, hon hevur lagt til merkis á slottinum. Hinvegin so kunnu vit ikki lata vera við at spyrja.

– Slottið er ógvuliga flott innan og uttan. Tað er gam-alt og ikki serliga nýtím-ansgjørt. Tað stendur tómt alt árið uttan um summarið, tá tað verður gjørt reint, og so tá kongafamiljan vitjar. Bert ein kona er á slottinum alt árið. So vit fimm vóru einsamallar, og vit stutt-leikaðu og hugnaðu okkum rættiliga í hesum serliga umhvørvinum, greiðir hon frá.

Uttan mun til tagnar-skyldu, so er eitt, hon hevur hug at fortelja.

– Eg havi hoppað í seing-ini hjá drotningini, flennir hon. Og hon heldur fram: Tann eina av okkum fimm stýrdi vaskiarbeiðinum. Hon hevði gjørt reint á slottinum fleiri ár á rað. Fyrsta dagin, vit komu á slottið, spurdi hon okkum: “Hevur nøkur tykkara nakrantíð hoppað í eini song hjá eini drotning”. “Nei”, svaraðu vit, og so lupu vit í seingina og hoppaðu har eina løtu.

– Hevði hon vitað.

Uttan at kunna greiða nærri frá, sigur Sunneva, at væl bar til at gera sær eina mynd av drotningini og familju hennara við at ganga runt á slottinum. At kaga inn á kømurini hjá prinsunum, Williami og Henry, og kamarið, har Charles og Diana hildu til.

– Nógv persónlig ting vórðu goymd burtur, okkurt stóð tó frammi, og vit kundu væl gera okkum eina mynd av, hvat teimum dámdi. Ein dagin, vit skuldu vaska í einum rúmi, fingu vit boð um at ansa eftir, soleiðis at vit ikki komu undir eina klokku, sum stóð innpakkað á ein-um borði. Eg skuldi støv-súgva inni í hesum góða rúmi, og uttan at eg varnaði tað, kom eg undir klokk-una. Hon small í gólvið og fór í knús. Tað vísti seg at vera ein klokka úr gulli, sum Viktoria drotning hevði átt. Tað stóð á klokk-uni. Eg mátti so siga sum var. Um klokkan kundi gerast aftur, ivist eg í.

Á slottinum stendur eis-ini gamli hestavognurin hjá Viktoriu drotning.

– Hann er ógvuliga flott-ur, og hann havi eg vaskað, sigur Sunneva.

## Alt endavent

Arbeiðsdagurin á Balmoral Castle byrjaði kl. hálvgum sjey á morgni og varð liðugur kl. seks á kvøldi. Sunneva var hvønn morgun heintað við bili hjá rein-gerðingsfyritøkuni, og koyritúrurin úr Aberdeen til Balmoral Castle tók trý korter.

– Tá ið vit koyrdu inn á slottsøkið, var bilurin, vit koyrdu í, einasti bilurin, sum slapp inn. Tað var stuttligt og serligt at upp-liva, tí øll, ikki minst tíð-indafólk, vilja sleppa inn. Tað var so strangt, at tá ið vit vaksaðu vindeyguni innan, mátti ein halda gar-dinurnar fyri meðan ein onnur vaskaði, soleiðis at eingin kundi kaga inn.

– Uppgávan hjá okkum var at vaska alt. Alt skuldi endavendast, vaskast og reinsast í sambandi við, at øll kongliga familjan skuldi koma. Eisini tornini skuldu vaskast. Har bar ikki so væl til at arbeiða, tí trappurnar vóru smalar. Vit høvdu nøkur rúm at vaska hvønn dag, men hóast tað, so var tíð til avlops, har vit tvætlaðu og stuttleikaði okkum. Og tá ið vit vóru lidnar, skuldu fólk av Buchingham Palace kanna eftir, um arbeiðið var nóg væl úr hondum greitt.



*– Uppgávan hjá okkum var at vaska alt. Alt skuldi endavend-ast, vaskast og reinsast í sambandi við, at øll kongliga familjan skuldi koma. Og tá ið vit vóru lidnar, skuldu fólk av Buchingham Palace kanna eftir, um arbeiðið var nóg væl úr hondum greitt, sigur Sunneva Lamhauge*

*Mynd: Sunneva Lamhauge*

gult cyan magenta svart





*Balmoral Castle uttan fyri Aberdeen í Skotlandi er summarbústaður hjá ensku kongafamiljuni*

*Mynd: Sunneva Lamhauge*

## Umtókt ferðamál

Balmoral Castle er eitt sera vakurt og bergtakandi gam-alt slott. Tað var navnframa enska drotningin, Victoria, ið lat slottið byggja mið-skeiðis í 19. øld. Slottið er bygt sum ein hestaskógvur við tveimum smærri slott-um við síðuna av. Slottið er ógvuliga væl umtókt ferðamál. Fleiri hundrað fólk úr øllum heraðshorn-um vitja slottið hvønn dag. Tey sleppa bert at síggja slottið, urtagarðin og økið uttan. Savn er eisini á slott-inum, sum ferðafólk hava atgongd til.

– Á savninum eru myndir av slottinum innan, soleiðis sum tað sá út, tá ið tað var bygt fyri meiri enn 150 árum síðani. Handlar og matstovur eru eisini fyri ferðafólk, sigur Sunneva.

Tá kongafamiljan vitjar slottið á hvørjum sumri, kemur samstundis ør-grynna av arbeiðsfólki, bæði av Buchingham Pa-lace í London og úr Skot-landi. Ein av gentunum, Sunneva arbeiddi saman við tær fimm vikurnar í fjør, skuldi eisini arbeiða á slottinum, meðan drotning-in var har.

– Tað hevði verið stuttligt at sloppið at verið har, meðan øll tann kongliga familjan er har. Annars velja tey ofta arbeiðsfólk, sum hava verið har fyrr. So eg fari aftur til Aberdeen í summar.

Hvussu tað kennist at hava gjørt reint fyri mæt-astu drotningina í heimin-um, sigur Sunneva:

– Eg hugsi ikki um tað sum so. Hon var jú ikki har. Men tað er klárt, at tað er stuttligt at hava upplivað tað. Serliga, tá ið eg hugsi um, at har eru nógv virðis-mikil og søgulig ting hjá kongligum, sum eru savnað gjøgnum fleiri ættarlið.

# Tórshavnar Musikkskúli nýtt Steinwayflygil

TÓNLEIKUR

*Eirikur Lindenskov*

Á samkomu í Listaskál-anum í gjár varð nýggja Steinwayflyglið hjá Tórs-havnar Musikkskúla, sum skal standa í Listaskál-anum, tikið í nýtslu.

Í hesum sambandið var ein lítil hugnaløta, har Bjarni Restorff, Jóhannes Andreasen og Stamen Stantchev spældu.

Tórshavnar Musikkskúli eigur nú tvey flygul, hitt stendur á loftinum á musikkskúlanum á Frúutrøð.



*Bjarni Restorff og Stamen Stantchev spæla á nýggja Steinwayflyglið í Listaskálanum*

*Mynd: Jens K. Vang*


Góðir brúktir frá

REYNI SERVICE

| | |
|---|---|
| TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK<br>Skrás.: 28-06-96<br>Km.: 78.000<br>Prísur: 165.600,- Garanti* | PEUGEOT 405 1,9 T-DIESEL (Sýnaður 09-00)<br>Skrás.: 10-01-96<br>Km.: 80.000<br>Prísur: 128.600,- Garanti* |
| TOYOTA CAMRY 2,0 GLI (Sýnaður 10-00)<br>Skrás.: 10-07-91<br>Km.: 129.000<br>Prísur: 62.600,- | OPEL ASTRA 1,6 I STW.<br>Skrás.: 03-11-97<br>Km.: 35.000<br>Prísur: 110.600,- Garanti* |
| TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN (Sýnaður 03-00)<br>Skrás.: 30-05-94<br>Km.: 109.000<br>Prísur: 89.600,- Garanti* | HYUANDAI ACCENT 1,5<br>Skrás.: 02-01-98<br>Km.: 25.000<br>Prísur: 79.600,- Garanti* |
| TOYOTA CARINA 2,0 GLI<br>Skrás.: 08-03-89<br>Km.: 250.000<br>Prísur: 36.600,- | RENAULT MEGANE 1,6 3 HURÐAR (Sýnaður 09-00)<br>Skrás.: 22-05-96<br>Km.: 100.000<br>Prísur: 65.600,- |
| TOYOTA COROLLA 1,4 SEDAN<br>Skrás.: 14-04-00<br>Km.: 27.000<br>Prísur: 142.600,- Garanti** | FORD ESCORT 1,6<br>Skrás.: 22-09-95<br>Km.: 87.000<br>Prísur: 74.600,- |
| TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL<br>Skrás.: 28-10-93<br>Km.:140.000<br>Prísur: 83.600,- Garanti* | CITROEN XANTIA DIESEL (Sýnaður 10-00)<br>Skrás.: 01-06-95<br>Km.: 266.000<br>Prísur: 69.600,- |
| TOYOTA COROLLA 1,6 LUNA L/B<br>Skrás.: 11-08-98<br>Km.: 17.000<br>Prísur: 132.600,- Garanti** | PEUGEOT 106 DIESEL (Sýnaður 03-00)<br>Skrás.: 01-08-95<br>Km.: 118.000<br>Prísur: 66.600,- |
| TOYOTA COROLLA 1,3 TERRA L/B<br>Skrás.: 30-09-98<br>Km.: 52.000<br>Prísur: 115.600,- Garanti** | SUZUKI ALTO 1,0<br>Skrás.: 09-04-97<br>Km.: 46.000<br>Prísur: 62.600,- |
| TOYOTA COROLLA 1,3 H/B G6<br>Skrás.: 19-11-98<br>Km.: 15.000<br>Prísur:124.600,- Garanti** | CITROEN BX DIESEL<br>Skrás.: 01-11-88<br>Prísur: 25.600,- |
| TOYOTA COROLLA 1,3 H/B<br>Skrás.: 20-04-99<br>Km.: 7.000<br>Prísur:114.600,- Garanti** | FORD ESCORT 1,8 DIESEL (Sýnaður 01-01)<br>Skrás.: 16-08-91<br>Km.: 134.000<br>Prísur: 42.600,- |
| VOLVO 460 SEDAN (Sýnaður 06-99)<br>Skrás.: 25-05-90<br>Km.: 92.000<br>Prísur: 48.600,- | MAZDA 323 (Sýnaður 07-00)<br>Skrás.: 29-04-87<br>Km.:168.000<br>Prísur: 18.600,- |

www.reyniservice.fo

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN.

** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrsta skrásetingar dato.

STØKK INN Á GÓLVIÐ

Sosialurin - 311820

REYNI SERVICE

Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00




Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040